## Frem fær eina viku

Spælararnir hjá danska Frem, har Atli Danielsen og Jón Rói Jacobsen eru í hópinum, hava sagt ja til at geva felagnum enn eina viku at kapitalin, sum restar í, fyri at endurreisa. Í fyrsta umfari eru boðini, at felagnum tørvar eina millión, um lønarskyldurnar skulu haldast. Hendir tað ikki, kunnu spælararnir krevja felagið á húsagang. Og boðini frá hópinum eru, at tað kravið verður sett fram hósdagin, um peningurin tó ikki er á bók.



## Henrik skal hjálpa Faxe

Fyrrverandi føroyski landsliðsvenjarin í fótbólti, Henrik Larsen, skal nú verða hjálparvenjari í superligafelagnum Randers. Høvuðsvenjari í Randers er John Faxe Jensen, og hann hevur nú skift hjálparvenjara. Faxe var ikki hugaður at halda fram við Stig Tøfting sum hjálparvenjara, og ístaðin hevur Faxe sent boð eftir Henrik Larsen. Harafturat skal Flemming Povlsen eisini verða ein hjálparvenjari, og hann skal serliga brúka orkuna til álopsspælið hjá liðnum. John Faxe Jensen, Henrik Larsen og Flemming Povlsen vunnu allir EM í fótbólti í 1992.

# 81 manningar í Klaksvík

Leygardagin verður startskotið til fyrstu FM-róðrarnar latið av. Sum vant verður hetta gjørt á norðoyastevnu í Klaksvík, har iki færri enn 52 bátsmanningar fara at taka lut í teimum sjey róðrunum. Og hartil verða eisini 29 barnamanningar við.

Til fyrstu FM-stevnuna er lutur kastaður um startrøðina, sum framgongur her á síðuni. Eftir hetta verður tað úrslitið av seinasta kappróðri, sum ger av, hvussu bátarnir liggja.




*So stendur kappróðrarárið fyri framman. Fyrsti FM-róðurin á árinum verður á norðoyastevnu um vikuskiftið*

**Barnaróður, dreingir**
3 Drekin
4 Tambar
5 Tekla
6 Erla Kongsdóttir
7 Junkarin
8 Teistin
9 Fípan Fagra
10 Kollur
11 Frúgvin
12 Strípan
13 Jallurin
14 Títlingur

**Barnaróður, gentur**
1 Drekin
2 Blikur
3 Tambar
4 Ørnin
5 Dúgvan
6 Firvaldur
7 Tekla
8 Tjaldrið
9 Spógvin
10 Fípan Fagra
11 Kollur
12 Frúgvin
13 Teistin
14 Royndin Fríða
15 Jallurin
16 Títlingur
17 Sílið

**5-mannafør, dreingir**
5 Firvaldur
6 Jallurin
7 Ritan
8 Blikur
9 Tjaldrið
10 Junkarin
11 Teistin
12 Royndin Fríða
13 Kollur

**6-mannafør, kvinnur**
6 Hvessingur
7 Lómur
8 Romvlvs (Romulus)
9 Sølmundur
10 ongurólvur
11 Jarnbardur
12 Páll Fangi

**5-mannafør, gentur**
4 Teistin
5 Katla
6 Havfrúgvin
7 Firvaldur
8 Hvassi
9 Falkur
10 Jallurin
11 Erla Kongsdóttir
12 Sílið
13 Blikur

**5-mannafør, kvinnur**
6 Erla Kongsdóttir
7 Frúgvin
8 Blikur
9 Hvassi
10 Ritan
11 Havfrúgvin
12 Teistin

**6-mannafør, menn**
3 Smyril
4 Rádni
5 Hósvíkingur
6 Lómur
7 Sundabáturin
8 Jarnbardur
9 Gongurólvur
10 Hvessingur
11 Tvørábáturin
12 Riddarin
13 Fortuna
14 Skúgvur
15 Lokkin

**8-mannafør**
8 Ørvur
9 Argjabáturin
10 Knørrur

**10-mannafør**
8 Ormurin Langi
9 Eysturoyingur
10 Klaksvíkingur

# Danska landsliðið fyrireikar seg væl

**Leygardagin spælir danska kvinnulandsliðið í flogbólti landsdyst ímóti Svøríki, og er tað síðsti liðurin í fyrireikingunum, áðrenn donsku flogbóltskvinnurnar koma til Føroya um eina viku at spæla tveir dystir ímóti føroysku kvinnunum**

FLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Leygardagin á miðdegi – sama dag, sum Svøríki og Danmark spæla fótbóltslandsdyst í EM-undankappingini – verður ein annar landsdystur millum londini bæði. Tá spæla donsku og svensku flogbóltskvinnurnar ein venjingardyst í Kildeskovhøllini í Gentofte.

Hetta er einasti dystur hjá danska kvinnulandsliðnum í Danmark í ár, og um eina góða viku skulu tær aftur av landinum at spæla, tá tær koma til Føroya at spæla tveir venjingardystir ímóti føroyska kvinnulandsliðnum, sum fyrireikar seg til Oyggjaleikirnar í Álandi seinni henda mánaðin.

Umframt henda eina landsdystin, spæla donsku og svensku kvinnurnar eisini tveir aðrar dystir í dag og sunnudagin, sum tó ikki fara at telja við sum altjóða dystir. Í dag og restina av vikuni venja donsku og svensku flogbóltslandsliðini saman í Idrættens Hus í Brøndby, so hetta er vorðið sum fyrireiking undan ferðini til Føroya.

Hetta kappingarárið hava donsku flogbóltskvinnurnar verið til tvær kappingar í januar og á einari venjingarferð í mai. Fyrst vóru tær við í Novotel Cup í Luxembourg, har tær taptu fyri Eysturríki og Azerbaijan, men vunnu 3-2 á vertunum. Síðani taptu tær allar tríggjar dystirnar í HM-undankapping í Estlandi, sum vóru ímóti Estlandi, Georgia og Moldova, og fyri trimum vikum taptu donsku kvinnurnar eisini tríggjar venjingardystir ímóti Bretlandi, sum vóru spældir í Sheffield.

Á ferðini higar verða tveir venjingarlandsdystir spældir millum Føroyar og Danmark. Tann fyrri verður í Trongisvági seinnapartin leygardagin 13. juni og tann seinni á Giljanesi sunnudagin 14. juni, áðrenn donsku flogbóltskvinnurnar fara av landinum aftur.